## »Hatesphere« gera bart



Danski bólkurin, Hatesphere, sum verður at hoyra á G! festivalinum seinni í ár, er í hesum døgum á konsertferð í sambandi við spildurnýggju útgávuna »Serpent Smiles and Killer Eyes«. Konsertirnar og harða arbeiðið sæst nú aftur í imponerandi konsertavrikum. Ummælarar lata sera væl at, og lovorðini frá fleiri teirra eru samsvarandi. Ró verður uppundir, at Hatesphere kunnu standa frammanfyri einum møguligum altjóða gjøgnumbroti. Bæði ummælarar frá Gaffa og B.T. hava ummælt nýggju fløguna hjá Hatesphere, og í báðum førum hevur fløgan fingið fimm av seks møguligum stjørnum.

## Nýggjur formaður í FH

Føroya Handverkarafelag hevði aðalfund í Kvívík leyðardagin har nýggjur formaður var valdur. Formaður nú er Henry Olsen úr Rituvík. Nevndin skipaði seg annars við Súna Simonsen úr Vestmanna sum næstformanni og Poul Øregaard úr Kollafirði sum starvsnevndarlimi.

# Visjónir fyri milliónir

**Nýumvældi og nýinnrættaði Skansakjallarin undir høvuðsbygninginum í Tinganesi, varð alment tikin í nýtslu seinnapartin í gjár, tá arbeiðsbólkarnir handan »Visjón 2015 – mál og vegir« handaðu løgmanni og landsstýrismonnum samlaðu frágreiðingarnar**




*Vegna allar strategibólkarnar handaði Petur Petersen, aðalstjóri í Mantamálaráðnum, bókina við frágreiðingunum í. Her fær løgmaður fyrsta eintakið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

VISJÓN 2015
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Skansakjallarin var mestsum á tremur av fólki, tá arbeiðsbólkarnir handan »Visjón 2015 – mál og vegir« handaðu løgmanni og landsstýrismonnum samlaða verkið.

Arbeitt hevur í longri tíð verið við at umvæla og innrætta kjallaran, sum í fordums tíðum varð nýttur at goyma brennivín, ið hald var lagt á av tollvaldinum. Summum høvdu helst dámað betur at sloppið inn í kjallaran tá, men einki er at taka seg aftur í, at hølið, sum nú skal verða kantina fyri starvsfólkinum í Tinganesi til gerandis, er vorðið sera snøgt og nossligt.

Sjálvandi er eisini ætlanin at nýta Skansakjallaran til móttøkur eins og hana, ið var í gjár, og okkara hægstu leiðslu nýtist ikki at smæðast við at bjóða fremmandum statsleiðarum inn í hugnaliga umhvørvið.

Hetta við at starvsfólk fáa mat á arbeiðsplássinum, er nakað, i vindir upp á seg í stórum. Tað er galdandi fyri privatar, hálvalmennar og almennar stovnar og fyritøkur. Hetta er helst ein ásannan av, at trivnaðurin á arbeiðsplássinum hevur alstóran týdning fyri starvsfólkið, og at arbeiðsgevarin fær mest effektiva starvsfólkið á tann hátt.

### Fremja visjónir

Sum nevnt var fitt av fólki í Skansakjallaranum til handanina, men hetta var á ongan hátt løgið ella óvæntað. Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, ið bjóðaði vælkomin og greiddi eitt sindur frá arbeiðinum hjá ymsu arbeiðsbólkunum, upplýsti, at áleið 160 fólk á ymsan hátt vóru knýtt at arbeiðinum.

Bara talið á limum í ymsu bólkunum er 149. Tó skal viðmerkjast, at summi nøvn ganga aftur í meiri enn tí eina bólkinum. Men uttan mun til tað sæst, at arbeiðið hevur verið ógvuliga umfatandi.

Eftir at løgmaður og landsstýrismenn høvdu fingið handað eitt eintak av bókini, fekk løgmaður orðið. Hann takkaði fyri eitt vælaverk og ivaðist ikki í, at henda bók fór at gerast ógvuliga týdningarmikil í arbeiðinum at fullføra visjón 2015.

- Eg rokni við, at ein stórur partur av tilmælunum í »Visjón 2015 – mál og vegir« verða framd í verki. Og eg ivist ikki í, at hetta verður nýtt sum uppslagsbók upp undir komandi løgtingsval – av øllum flokkum, segði løgmaður, tá vit spurdu hann um, hvat hann væntaði av úrslitum av hesum arbeiði.

### 13 grundarsteinar

Í bókini verða sum nevnt frágreiðingarnar og tilmælini frá øllum 13 grundarsteinunum savnaðar. Ógvuliga lýsandi eru grundsteinarnir teknaðir sum ein varði á forsíðuni. Hesin skal ímynda, hvussu tær frágreiðingar – strategiir – ið bólkarnir hava lagt fram, skal føra fram móti endaliga úrslitinum, sum visjón 2015 leggur upp til, nevniliga, at Føroyar skal teljast millum heimsins fremstu lond ár 2015.

Teir 13 grundarsteinarnir eru í raðfylgju, sum teir verða presenteraðir í bókini **alheimsgerð**. Her verður víst á, hvussu neyðugt tað er at Føroyar gerast partur av alheiminum og tí alsamt vaksandi alheimsmarknaðinum við øktum frælsi fyri bæði vørur, tænastur, kapital, fólk og fyritøkur.

**Útbúgving** er grundarsteinurin, ið Føroyar skulu byggja á. Fleiri fólk skulu útbúgvast longri, og størsti parturin av ungdóminum skal hava eina hægri útbúgving.

Við útbúgving fylgir náttúrliga **gransking**. Her eiga føroyingar at ganga á odda, ikki bara innan økir, har vit náttúrliga hava bestu fyritreytir, eitt nú matur úr sjónum, men eisini innan onnur øki skulu vit skapa bestu fyritreytirnar.

**Íverksetan** er annar týdningarmikil táttur í framtíðar Føroyum. Hugskotsmenning og nýskapanarkunnleiki skal gerast náttúrligur partur av undirvísingini.

Framtíðar samfeløg mugu eisini menna seg innan **kunningartøkni**, sum er ein avgjørdur partur av alheimsgerðini.

**Tilfeingið** skal røkjast á mest skynsama hátt soleiðis, at øll tilfeingisvinna byggir á burðardygga veiði.

Føroyski **samfelagsbygnaðurin** skal byggja á burðardyggan marknaðarbúskap, sum er grundfestur í vælferðarsamfelagnum. Við í hendan samfelagsbygnaðin hoyrir eitt sera framkomið **infrakervi**, sum bindir bygdir og oyggjar saman á mest samfelagsgagnligan hátt.

**Umhvørvið** er av alstórum týdningi, ikki bara fyri okkara egnu vælveru, men í líka stóran mun fyri at verja okkara støðu sum veitarar av fiski úr heimsins reinasta havi.

Av tí at **mentan** og list nú eru heiðurligur partur av landsins bruttotjóðarinntøku, og innbygdur partur av okkara útbúgving, er kappingarførleiki Føroya sterkur á hesum øki.

Málið er, at allar Føroyar í 2015 skulu vera ein **arbeiðsmarknaður**. Tað skal verða lætt at búgva í einum øki av landinum, men arbeiða og nýta tænastur í øðrum parti.

**Vælferð** hins einstaka er aðalmálið við øllum frambурði, og tískil eigur borgarin at setast í miðdepilin.

Seinasti grundsteinurin er **sjálvstýri**. Hetta er einasti bólkurin, har limirnir eru politiskir, formenninir í teimum seks flokkunum á tingi, umframt Jóan Paula Joensen, ið var skrivari.